ítróttur

Nr. 244 • týsdagur • 20. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jón Rói í superliguna

**Tað er vónleyst at fáa tíðindini alment váttað, men eftir øllum at døma kann Jón Rói Jacobsen í morgin kalla seg fyri AaB-spælara**

YRKISSÁTTMÁLI
*Jákup Mørk*

Tíðindafundur er mikumorgunin kl. 10. Tað er tað einasta, sum alment fæst at vita, nú Jón Rói Jacobsen fer aftur til superliguna.

Jákup í Stórustovu, sum er umboðsmaður hjá Jón Róa, hevur kalla inn til tíðindafund mikumorgunin. Men hann vil ikki siga tað allar minsta um, hvat fundurin snýr seg um. Hvørki um navn á spælara ella felag.

Frá keldum í Danmark hava vit tó fingið staðfest, at talan er um Jón Róa Jacobsen, sum nú skal verða liðfelagi hjá Súna Olsen í Aalborg og AaB.

Her hevur ítróttarstjórin í felagnum, Lynge Jacobsen, sagt, at felagið hevur ætlanir um at styrkja sær um verjuna. Og at tað als ikki er ósannlíkt, at hetta verður greitt fyri jól.



*Eingin av høvu›spersónunum í málinum vil gera vi›merkingar. Men keldur í Danmark vátta›, at Jón Rói Jacobsen í morgin kann kalla seg AaB-spælara*

Tá talan er um fyritøku, sum er skrásett á virðisbrævamarknaðinum, er tó vónleyst at fáa nakrar viðmerkingar um konkreta málið. Øll viðurskifti, sum kunnu ávirka fyritøkuna, skulu fyrst og fremst boðast til partaeigararnar, áðrenn tey verða almenn í fjølmiðlunum.

Vit hava eisini havt orðið á høvuðspersóninum sjálvum, men heldur ikki hann fæst at siga nakað sum helst um málið.

- Eg eri heima í jólafrí. Um talan er um spurningar, sum viðvíkja míni framtíð, so mugu tit tosa við Jákup í Stórustovu, er einasta viðmerkingin, sum Jón Rói Jacobsen sjálvur hevur til málið.

Jón Rói Jacobsen hevur spælt við Frem tey bæði seinastu kappingarárini. Í vár var felagið nær við at vinna seg í superliguna, men síðani hevur gingið skjótt aftureftir. Í heyst hevur felagið verið í niðara enda av næst bestu deildini, og tað hevur eisini fingið avleiðingar, at felagið ikki hevur peningin, sum kann stuðla upp undir vónina um uppflyting. Ebbe Skovdahl, sum er ein av mest virdu venjarunum í Danmark, og sum heldur nógv av Jón Róa, legði frá sær fyri stuttum. Hetta gjørdi hann, tí hann var ikki samdur við leiðsluna í felagnum um framtíðar leistin fyri felagið. Seinni eru eisini fleiri av stuðulsspælarunum farnir úr felagnum.

# Føroyar eru um at missa India úr eygsjón

**Á nýggja FIFA styrkislistanum hava Føroyar mist sjey stig, meðan fleiri at tjóðunum, sum hava verið í nánd av føroyingunum, flyta seg rætta vegin**

FIFA STYRKISLISTIN
*Jóannes Hansen*

Føroyar og India hava sambært FIFA styrkislistanum leingi verið roknað at eiga eins stinn landslið í fótbólti. Tað kann ikki sigast at vera so galið. Í India eru tey omanfyri milliardina, men tá ið tey hava kjósað sær ellivu teir bestu at spæla fótbólt, so hevur FIFA - út frá úrslitunum seinastu árini - mett, at teirra landslið hevði somu styrki, sum liðið við teimum ellivu, ið hava verið valdir í Føroyum. Fólkatalið í Føroyum er umleið 0,005 procent av tí, sum tað er í India!

Men nú tykist tað at vera ein farin tíð, at føroyingar við FIFA styrkislistanum sum grundarlag hava havt møguleika at ganga út frá, at teir bestu ellivu í okkara lið í fótbólti vóru eins stinnir sum teir fyrstu ellivu í India.

Á FIFA listanum, sum varð kunngjørdur mánadagin 19. desember, er styrkistalið hjá India hækkað við 31 stigum. Hjá Føroyum er tað lækkað við sjey stigum. Styrkistalið hjá India er nú 355, og hjá Føroyum er tað 325. FIFA hevur roknað seg fram til, at indiska landsliðið er nummar 127, og at føroyska landsliðið er nummar 132. India er flutt átta pláss rætta vegin, og Føroyar eru dotnar eitt pláss skeiva vegin.

Næsti FIFA listin verður kunngjørdur 18. januar í 2006, og tað kann væl hugsast, at Føroyar fara at detta longri niður. Maldivirnar eru á plássinum undir Føroyum. Síðsta mánaðin hava tær vunnið 41 stig afturat, og tað hevur havt við sær, at tær eru fluttar fjúrtan pláss fram. Maldivirnar hava 323 stig og eru bara eitt stig aftanfyri Føroyar.

Føroyingar plaga við serligum áhuga at fylgja við í, hvussu gongdin er hjá Malta, Liktinstein, Andorra, Luksemborg, San Marino og kanska eisini Kypros. Liktinstein er flutt tvey pláss fram. Nú verður fyrstadømið roknað at eiga 122. besta landsliðið í heiminum. Andorra er eisini flutt tvey pláss rætta vegin. Nú verður Andorra mett at eiga 125. besta landsliðið í heiminum. Hjá Luksemborg er støðan á listanum eisini betri nú, enn hon var fyri einum mánað síðani. Nú er Luksemborg á 150. plássinum. Á næstsíðsta listanum var Luksemborg nummar 152. San Marino er nummar 238. Eisini San Marino hevur tikið seg tvey pláss upp eftir listanum.

Kypros og Ísland eru ávikavíst á 96. og 94. plássinum. Meðan Kypros hevur lyft seg eitt pláss rætta vegin, so er Ísland dottið eitt pláss eftir hæli.

### Líkist sær sjálvum

Nú tað er tað eitt hálvt ár, inntil sjøtul verður settur á HM endaspælið í Týsklandi, líkist toppurin á FIFA listanum sær sjálvum. Hann sær út, sum hann hevur sæð út heilt leingi. Brasilia er ovast, og Kekkia er næstfremst. Næstu fótbóltstjóðirnar eru Holland og Argentina. Frakland hevur verið og er á fimta plássi, men nú verða bæði Meksiko og Spania roknað at eiga eins stinn landslið, sum liðið hjá fraklendingum verður mett at vera.

Á næstu plássunum eru USA, Ongland, Portugal og Turkaland og Italia. Danmark er framvegis á trettanda plássinum. Tað vil siga, at danir verða mettir at eiga besta fótbóltslandsliðið í Norðurlondum, og tað vil eisini siga, at Danmark eigur tað landsliðið, sum er hægst styrkismett og sum kortini ikki verður partur av HM endaspælinum í summar.

Svøríki og Japan eru nummar fjúrtan og fimtan, og týsku vertirnir fyri HM endaspælinum verða í løtuni roknaðir at eiga 16. besta landsliðið í heiminum. Teir eru á hesum plássinum saman við Grikkalandi.

Av teimum 31 fótbóltstjóðunum, sum saman við Týsklandi hava kvalifiserað seg til endaspælið næsta summar, er Angola tann tjóðin, ið sambært FIFA styrkislistan hesa ferð verður roknað at eiga veikasta fótbóltslandsliðið. Angola er á 61. plássinum. Í endaspælinum er Angola í bólki saman við Meksiko, Iran og Portugal.

## Claus fekk fyrstu jólagávuna

**Coventry var kroyst í botn, men kortini fóru teir úr London við fullari úrtøku. Hetta var fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at tað eydnaðist at fáa alt við til hús**

ONGLAND 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Tað var gott lag í spælarabussinum hjá Coventry, tá ið teir mánakvøldið fóru úr London og til hús aftur. Og tað var ikki at undrast á. Á Loftus Road høvdu teir vunnið 1-0 á Queens Park Rangers, sum í vánaligari uppgerð hevði verið leikliga omaná, men ikki hevði evnað at fingið mál.

Hetta var fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at Coventry fekk fult á útivølli. Bretskir fjølmiðlar vilja vera við, at Coventry spældi illa, ja heilt vánaliga. Málið fingu teir við brotssparki, tá ið tað restaðu fimm minuttir. Talan var um jólagávu frá QPR. Málverjin hjá teimum, sum var á veg til fyri fyrstu ferð í níggju dystum at halda tætt, tók beinini undan mótstøðumanni. Hann fekk reyða kortið, og Coventry umsetti væl úr ellivu metrum.

Claus Bech Jørgensen, sum er einasti føroyski fótbóltsspælarin, sum í løtuni spælir í landskapping, sat á beinkinum, inntil tað bara restaði ein lítil løta. Tá varð hann settur á vøllin fyri McSheffrey, sum hevði skorað málið.

Annan jóladag skal Coventry aftur í eldin. Tá skulu teir spæla í Leeds.